## Turkur í Kina

Varandi turkur í Suður-, Mið- og Eysturkina hevur havt við sær, at áirnar eru minkaðar óvanliga nógv. Eitt nú vísa mátingar, at áin Zhujiang hevur ikki verið so lítil síðani 1941. Avfallið í august og september var nógv minni enn vanligt, og tað hevur millum annað havt við sær, at tann størsta áin í Kina, Yangtze, hevur ikki verið so lítil tey seinastu 23 árini. Yangtze og hinar stóru áirnar hava sera stóran týdning sum samferðsluæðrar, men nú eru áirnar so grunnar nógvastaðni, at tað kann órógva skipaferðsluna.



## Sóu risastóran háv

Fólk, sum stuttleika sær við at surfa úti fyri strondini í Queensland í Avstralia, eru vorðin meiri varin, nú tað er komið fram, at ein ovurstórur hvítHávur heldur til har um vegir. Eingin hevur sæð tann stóra hávin, men tá menn um vikuskiftið fóru aftir einum hávi, sum var komin á eina hávalínu, vísti tað seg, at ein ovurstórur hávur hevði bitið hann so illa í tveimum bitum, at hann var næstan farin tvørturav. Hávurin á línuni var tríggjar metrar langur, og serfrøðingar meta tí, at tann, sum beit hann, man hava verið minst sjey metrar til longdar, skrivar Reuters.



*»Det var kult gjort«, segði Per Petterson, tá hann í gjárkvøldið takkaði fyri Bókmentavirðisløn Norðurlandráðsins*

*Mynd: Magnus Fröderberg/norden.org*

# Føroyar handað bókmentavirðisløn

**Í ár fingu Føroyar heiðurin at handa Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, sum hesuferð var latin norska skaldinum Per Petterson**

HANDAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað gjørdist Bergur Djurhuus Hansen, sum vegna dómsnevndina í ár fekk heiðurin at handa størstu norðurlendsku virðislønina í bókmentum, Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins á 350.000 krónur

Fyrr í ár samdist dómsnevndin um at lata norska stórskaldinum Per Petterson virðislønina fyri 2009, og sjálv handanin fór fram á stórum hátíðarhaldi í Stokkholm í gjárkvøldið.

### Gløgg og vøkur prosa

Per Petterson fær virðislønina fyri skaldsøguna *Jeg forbanner tidens elv* og í røðuni til handanina, læt Bergur D. Hansen ongan iva vera um, at talan er um eina heilt sermerkta frásøgn, sum longu sæst í heitinum.

– Tað krevur dirvi at skriva eina skaldsøgu við heitinum "Jeg forbanner tidens elv". Heitið bendir á eina vónleysa og alt ov menniskjaliga trongd at seta seg út um tíð og stað. Og heitið er tvíbundið, øðrumegin er tað størsligið, næstan mytiskt og á tremur við veldugum treiskni, hinumegin avdúkar tað impotent ráðaloysi og resignatión, staðfesti Bergur D. Hansen í røðini.

Hann legið afturat, at tað er tankavekjandi at heitið stavar frá eini yrking hjá Mao, har uppreistrarsinnaði politiski leiðarin vísir seg sjálvan sum eitt menniskja uttan makt yvir grundleggjandi treytunum í tilveruni.

Í røðuni vísti Bergur D. Hansen á, at sermerkta styrkin hjá Petterson í hesi skaldsøguni er hansara sjáldsama vakra og gløgga prosa. Grundleggjandi snýr skaldsøgan segi um tørvin hjá menniskjanum á nærleika, lívssamanhangi og endurloysn, og hon verður til stóra list í sínum máli.

– Tí sjálvt um frásøgnin um Arvid Jansen býr í søgugongdini, so kemur hennara søk fram í sjálvum málinum - í fínu, stillisligu prosaini hjá Pettersen, har orðini leggja seg kring tøgnina, sum tað ongantíð eydnast persónunum at bróta, segði Bergur D. Hansen, sum við hesum orðum handaði Per Petterson Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2009

### »Kult gjort«

Kanska ikki heilt óvæntað takkaði Petterson við eini frásøgn, ið næstan kundi verið tikin beint úr onkrari av hansara bókum.

Frá pallinum mintist Petterson pápa sín, sum arbeiddi á skógvafabrikkini, sum elskaði cowboybøkur, men lat heimsklassikaranar standa til pynt í síni útskornu reol. Og mammu sína, sum arbeiddi á sjokulátafabrikkini, sum las alt, men ikki átti eina einastu bók.

– Høvdu tey sæð meg nú, høvdu tey svímað av smædni, men tað má vera harvið. Eg takki teimum allíkavæl, segði Petterson í tí hann eisini takkaðu dómsnevndini fyri at hann slapp at uppliva hetta

»Det var kult gjort«, segði Per Petterson

### Øll við

Í stuttari viðmerking sigur Bergur D. Hansen, at tað var stuttligt at sleppa at handa Per Petterson heiðurslønina. Sjálvur heldur hann Petterson vera ein framúr góðan stílist, hvørs prosa má metast at vera heilt einastandandi í mátanum, hon bæði er klók, vøkur og grúsom í senn.

– Tað mest sermerkta er kanska, at hann megnar at skriva bøkur á sera høgum málsliga listarligum støði, sum øll kortini lættliga kunnu lesa, sigur Bergur D. Hannsen.

Hetta er aðru ferð føroyska umboðið handar Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Seinast var í 2003, tá Turið Sigurðadóttir handaði Evu Strøm virðislønina.

## Jólabók til tey minstu




Nýggj jólabók er komin til børn undir skúlaaldur. Bókin *Tey allarfyrstu jólini* sigur søguna um, tá boðini komu um at Jesus skuldi føðast, ferðina hjá Mariu og Jósef til Betlehem, hiðravitjanina og annað. Í bókini eru sera vakrar myndir og harafturat eru meir enn 130 klistrimerki, sum børnini kunnu líma inn í bókina.

Tað er Heimamissiónsforlagið sum gevur út *Tey allarfyrstu jólini*, sum fæst hjá forlagnum og í bókabúðum kring landið.